


www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 10 - 2012

# Íslendska oljulóggávan ikki kappingarfør

Oljulóggávan í Íslandi er ikki kappingarfør við tilsvarandi lóggávu í grannalondunum, og hon hevur verið viðvirkandi til, at oljufeløgini hava víst so lítlan áhuga fyri at leita eftir olju á Drekaleiðini. Tað skrivar Morgunblaðið. Sagt verður, at eftir íslendsku lóggávuni skulu oljufeløgini bera alla ábyrgd í sambandi við leiting, samstundis sum tey skulu rinda skatt av ágóðanum. Hetta hevur gjørt, at tann íslendska lóggávan kann ikki kappast við eitt nú ta norsku. Úrslitið sæst eisini. Meðan lítil áhugi er at leita í íslendskum øki, hevur áhugin ongantíð verið størri at leita í norskum øki, og støðugt fleiri og størri feløg leita sær hagar. Í Morgunblaðnum verður eisini fýlst á, at fjølmiðlarnir, vinnufelagsskapir og Altingið hava víst alt ov lítlan áhuga fyri at kanna, hvussu grannarnir hjá Íslandi bera seg at í sambandi við oljuvinnuna.